# Broytingar í toppinum

**Thomas Magnussen er nýggjur stjóri í Smyril Line, eftir at hann í hálvt ár hevur verið nevndarformaður. Nýggjur nevndarformaður er norski Edvard Heen**

SMYRIL LINE
*Jákup Mørk*

Smyril Line fær eitt nýtt andlit úteftir. Norski Jan Walle, sum síðani 1. apríl hevur stjórnað felagnum, verður nú avloystur av Thomasi Magnussen.

Thomas Magnussen er 43 ára gamal og útbúgvin løgfrøðingur. Undan nýggju setanini á Smyril Line hevur hann verið stjóri á Skeiðsdeplinum. Fyri hetta hevur hann verið stjóri á Strandfaraskipum Landsins, eins og hann í átta ár var stjóri á Lønardeildini undir Fíggjarmálastýrinum.

Edvard Heen varð valdur í nevndinia í felagnum, tá Klæmint Weihe fyrr í ár fór frá sum nevndarformaður. Hann varð valdur av Tryg- Edvard Heen hevur seinastu 12 árini røkt ymiskt størv innan norsku fíggjar- og KT-vinnuna.




*Nýggjur nevndarformaður í Smyril Line er norski Edvard Heen. Hann varð valdur í nevndina í vár, tá Klæmint Weihe valdi at taka seg úr nevndini*

**Framtaksgrunnurin størstur**

Umframt umskipanirnar í leiðsluni, hevur er partapeningurin hjá felagnum hækkaður. TF-Holding og Framtaksgrunnurin hava sett 15 mió kr. í hvør, og eru tey eisini størstu partaeigararnir.

Framtaksgrunnurin stendur nú fyri á leið 35% av partapeninginum í felagnum. TF-Holding hevur 25%, meðan luturin hjá hetlendska Menningargrunninum nú er á leið 17%.

Fyrr í ár var annars talan um, at hetlendski parturin skuldi økjast við 50 mió kr. Hetta var tó treytað av, at Smyril Line keypti seg inn sum høvuðspartaeigari í norska Fjord-Line. Tann handilin varð tó av ongum, og tí fall tilsøgnin úr Hetlandi aftur. Hetlendingum stóð eisini í boði at verða partur av kapitalhækkanini, sum nú er gjøgnumførd, men teir ynsktu ikki at taka av hesum, varð upplýst á tíðindafundi, sum Smyril Line hevði í dag.

## Hallið í 2005 verður 40 mió kr.

**Talan verður aftur í ár um veldugt hall. Men longu í 2006 verður mett, at inntøkur og útreiðslu javnviga. Og í 2007 verður talan ætlandi um yvirskot**

SMYRIL LINE
*Jákup Mørk*

Tað eru ikki smápengar, sum tosað verður um, tá roknskapurin hjá Smyril Line verður umrøddur.

Stór hall hava verið gerandiskostur, síðani nýggja Norrøna kom til Føroya, og í 2005 verður talan helst um størsta hallið higartil.

- Vit rokna við, at talan í ár verður um einar 40 mió kr. í halli, staðfestir Edvard Heen, nevndarformaður í felagnum.

- Hetta er sjálvandi ikki nøktandi, men vit rokna við, at vit longu í komandi ári hava javnvág í rakstrinum. Og frá 2006 at rokna, skuldu vit gjarna aftur havt yvirskot. Fyrst og fremst, so verður tryggingarfelagnum, sum umvegis sín eigaraskap velur ein nevndarlim.um pening.

- Hesir lutir eiga at tryggja okkum javnvág í roknskapinum, og frá 2007 at rokna vænta vit so, at flutningurin av ali- og feskfiski aftur er í øking. Tað vil aftur innibera eina størri inntøku, og tí meta vit talan vera um eina ætlan, sum fer at síggjast aftur í veruligu tølunum, sigur Edvard Heen.

**Útvald lyklatøl úr roknskapinum**

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Úrslit | 21.033 | 11.205 | -34.995 | -23.881 |
| Eginpeningur | 210.327 | 221.532 | 186.537 | 165.357 |
| Soliditetur | 84 | 81 | 21 | 21 |
| Gjaldførislutfall | 439 | 164 | 48 | 47 |

## Nú kunnu vit reka reiðaravirksemi

**Thomas Magnussen tók í dag við sum stjóri hjá Smyril Line. Hann fegnast um, at felagið nú kann savna tankarnar um sjálvan raksturin av felagnum**

SMYRIL LINE
*Jákup Mørk*

- Við umskipanunum, sum nú eru gjøgnumførdar, og kapitaltilgongdini hava vit tryggjað grundarlagnum undir felagnum. Tí kunnu vit nú loyva okkum at flyta fokus frá eini sperdari fíggjarstøðu til sjálvan raksturin, og tað fegnast vit um.

Soleiðis segði nýggi stjórin á Smyril Line, Thomas Magnussen, tá hann í dag tók við sum stjóri eftir norska Jan Walle.

**Vænta vøkstur**

Hóast tølini hjá felagnum hava verið dapur lesnaður, síðani nýggja Norrøna kom til landið, so var tað ein bjartskygdur stjóri, sum var á tíðindafundi hjá felagnum hósmorgunin.

- Vit vænta, at hetta væl og virðiliga kann bera til. Serliga á ferðafólkasíðuni rokna vit við, at talan verður um munandi størri inntøkur. Og vit halda ikki, at hetta bara eru luftkastellir, leggur hann afturat.

- Fyrst og fremst, so hava vit við nýggju avtaluni við Fjord Line fingið eina góðu rutu, sum væl kann vísa seg at geva heilt stórar inntøkur. Hartil, so hava vit ár verið nógv fyrri á útlendsku marknaðunum, og longu nú síggja vit, at bólkaferðirnar mest sum eru eksploderaðar. Og at enda, so hevði tað í vár eina negativa effekt, at somikið stórur ivi var sáddur um framtíðina hjá felagnum. Tað hevði við sær, at fleiri fólk settust aftur - ella valdu aðrar ferðamøguleikar. Ein trupulleiki, sum vit ikki rokna við í ár.

- Nú ræður so um at optimera ymsu pakkarnar, sum vit hava at bjóða, soleiðis at vit á tann hátt kunnu skapa enn meira vøkstur. Men vit halda, at vit í løgdu fíggjarætlanunum hava verið sera varnir í metingunum. Og tí ivist eg ikki í, at hetta nú fer at bera til, soleiðis at Smyril Line gongur eini tryggari framtíð í møti, segði nýggi stjórin at enda.




*Nýggi stjórin á Smyril Line fegnast um, at felagið nú kann nýta kreftirnar upp á kjarnuøkið hjá felagnum, heldur enn alla tíðina at skula hugsa um sperdu fíggjarstøðuna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*